# Nýggjar útgávur

**Friðaðir stórhvalir og eftir Kristi føðing eru myndaevnini á nýggju frímerkjunum, sum Postverk Føroya gevur út**

FRÍMERKI
*Turið Kjølbro*

Mánadagin koma seks nýggj frímerki á marknaðin. Friðaðir stórhvalir er myndaevnið á fýra frímerkjum, sum Edward Fuglø hevur sniðskapað. Talan er um avgustin, sum livir í øllum teim stóru heimshøvunum, nebbafiskin, sum livir í einum øki kring pólarnar og í Norðuratlantshavi, royðin, sum reikar kring pólleiðirnar, og seiðhvalin, sum heldur til á pólleiðunum bæði í Atlantshavinum og Stillahavinum. Virðini á frímerkjunum eru 4.50, 6.50, 9.00 og 20.00 krónur.

Eftir Kristi føðing er myndaevnið á tveimum frímerkjum, virði 4.50 og 6.00 krónur, sum eisini koma út mánadagin. Anker Eli Petersen, sum hevur sniðskapað hesi bæði frímerkini, hevur gjørt nógv frímerki fyri Postverk Føroya, sum lýsa átrúnaðarlig myndaevni og tekstir. Hesi bæði eru tey seinastu í røðini um upphavið, Kristi føðing og avleiðingarnar av hesum.




### Nýggj heimasíða

Sum eitt stig í tænastuveitingunum mótvegis viðskiftafólkinum hjá Postverki Føroya og fyri at styrkja leiklutin hjá frímerkinum sum mentunarberi, hevur Postverk Føroya gjørt eina siðsøguliga heimasíðu, tey kalla www.tjatsi.fo. Endamálið við hesum dátagrunni er, at hann skal verða ein livandi og samvirkandi depil fyri fólk við áhuga fyri siðsøgu, og ein íblástur hjá frímerkjasavnarum við serligum áhuga fyri júst hesum evnisvalinum. Tjatsi, sum er á fýra málum: føroyskum, donskum, enskum og týskum, verður sum frálíður víðkað við tilfari frá frímerkjaútgávum. Umframt við viðkomandi tilfari frá frímerkjaútgávum í øðrum londum.

# Tímabýtið skal broytast

**Enn hevur bert ein fólkaskúli gjørt eftir áheitan frá Føroya Lærarafelag um at senda inn tímatørvin**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Tíðliga í summar heitti Føroya Lærarafelag á allar fólkaskúlar kring landið um at gera upp veruliga tørvin á tímum og senda felagnum uppgerðina. Enn hevur bert ein fólkaskúli gjørt eftir áheitan, og felagið minnir tí skúlarnar enn eina ferð á um at koma við uppgerðini. Endamálið við hesi áheitan er at broyta skipanina við tímabýtinum soleiðis, at skúlarnir fáa tímarnar, sum tørvur er á, og ikki sum nú, har skúlarnir fáa eitt tímatal og út frá tí royna at fáa kabalina at ganga upp. Og kabalin gongur ikki upp alla staðni. Ein sannroynd er, at skúlar ikki kunnu bjóða næmingum sínum lærugreinir, sum eru kravdar sambært lóg, vegna ov fáar tímar.

Tímabýtið verður roknað eftir einum frymli, einum sparifrymli, sum varð settur í verk í fólkaskúlanum í ringastu kreppuárunum fyrst í nítiárunum. Hesin frymilin setur framvegis dagskránna í skúlanum, og allir, serliga teir miðalstóru skúlarnir, eru við skerdan lut. Mentamálastýrið er kunnað um tiltakið hjá Føroya Lærarafelag, og sum skilst á forkvinnu felagsins, Elsu Birgittu P. Petersen, er Mentamálastýrið áhugað í, at skipanin verður broytt.

- Skúlaverkið eigur at verða skipað á sama hátt sum almannaverkið, har uppgávurnar og skyldurnar eru lógarbundnar og tískil fáa ta játtan, sum krevst. Sum er fær alt skúlaverkið eina játtan, sum alt skal kroystar niður í, uttan mun til um rúm er fyri tí ella ikki, og eru eingir pengar, verða uppgávur strikaðar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Skyldur og uppgávur í fólkaskúlanum hava áður verða lógarkravdar.

Umframt arbeiðir Føroya Lærarafelag við at broyta skipanina soleiðis, at tímarnir ikki verða býttir út á næmingarnar, men heldur á flokkarnar. Hesin frymilin, sum eisini kom í kreppuárunum, er ongantíð dagførdur ella endurskoðaður, hóast skúlaleiðarar hava víst á skeivleikar og møguligar ábøtur, sum eiga at verða gjørdar

Føroya Lærarafelag hevur sett fólk av til uppgávuna at endavenda skipanina við tímabýtinum, og miðar eftir at verða liðugt við uppgávuna sum skjótast.





VÆLKOMIN
Á
VØRUMESSU
2001

Í Ítróttarhøllini á Hálsi 14-16 september

Vørumessan'2001 vendir sær serliga til matvøru-, gávu-, klædna- og el-handlar, kioskir, matstovur, gistingarhús, hotell, virki, stovnar, sjúkrahús, reiðarí, tekni- og skrivstovur.

1 Tera & IDÉ møblar
1A Landshandilin
2 Petur Gaardlykke
3 Jógvan Weihe P/f
4 TeleF
5 El og Tele
6 Tøting P/f
7 Vema Jacobsen
8 Eysturoyar Heilsøla P/f
9 Trio Import Sp/f
10 Føroya Bjór P/f
11 Handilshúsið Sp/f
12 Elding Catering Sp/f
13 J.B.Trade Sp/f
14 Norðvág Heilsøla
15 Thomas Dam á Hálsi P/f
16 Scanvægt Nordic A/S
17 Verkhúsið Stíggjur
A Tera
B J.F.Kjølbro
18 J.F.Kjølbro P/f
19 Damfar
20 Anith Sp/f
21 Poul Hansen P/f
22 Meginfelag Búnaðarmanna MBM
23 Poul Michelsen P/f
24 Hestprent Sp/f
25 Kemilux Industri P/f
26 Poul Michelsen P/f
27 EB Heilsølan
28 ADC Heilsølan Sp/f
29 Foss-El Sp/f
30 Eimskip P/f
31 Kristian Gravesen
32 Inventartænastan Sp/f
33 Com-Data P/f
34 Sirri Sp/f
35 Føroya Tele P/f

Kom og síggj hvat framleiðarar, heilsølur, umboðsfólk og tænastufyritøkur hava at bjóða!

*Upplatingartíðir:*
Fríggjadagin 14. sept. 10:00 - 19:00
Leygardagin 15. sept. 10:00 - 19:00
Sunnudagin 16. sept. 13:00 - 19:00

Vørumessan'2001 verður sett fríggjamorgunin kl. 10:15 av Bjarna Djurholm landsstýrismanni.

*Børn undir 14 ár onga atgongd.*




# Oljulýsingar og hugskotslist

**Leygardagin seinnapartin letur Tummas Jákup Thomsen upp listaframsýning í Listaskálanum í Havn. Á framsýningini vera oljumálningar, træskurðir, tekningar og hugskotslist**

FRAMSÝNING
*Turið Kjølbro*



Tekningin hevur ligið listamanninum úr Gøtu, Tummas Jákupi Thomasen, fremst í huga í mong ár, sum tøknin, hann best hevur kunnað lýst hug og tankar við. Á framsýningini, sum letur upp í Listaskálanum leygardagin, eru fleiri tekningar, sum eru settar saman til eina stóra brotamynd. Seinastu tvey árini er hann eisini farin at mála aftur, tó enn við tekning í summum av málningunum. Flestu málningarnir eru málaðir á Ekely í Oslo, har Edvard Munch búði og virkaði sum málari. Tummas Jákup kallar málningarnar fyri oljulýsingar, lýsingar av náttúru og tøkni, menniskju og náttúru, eins og fiski og hvali og havi.

Tummas Jákup Thomsen er eftir øllum at døma fjølbroyttur listamaður. Hann hevur fingist nakað við træskurð, og hugskotslist ella concept-list, sum tað verður rópt aðra staðni, ger hann eisini. Hetta er ein máti at siga, greiða frá einum tanka ella eini søgu. “Stol på mig!” var heiti á seks stólum, hann læt inn til eina framsýning í Danmark.

Tummas Jákup Thomsen er føddur í Norðragøtu í 1962. Í list síni endurspeglar hann postdadaismunnar og postsurrealismunnar rák og rørslur. Tummas Jákup stendur fyri øðrum hugburði til tann myndlistarliga framburðin enn beinleiðis at gera bílæti. Myndin í sær sjálvum hevur mangan minni týdning enn hugskotið, hugfangið. Í dreymakendum og absurdum samandráttum, harí ósambærilig fyribrigdi og skuggsjónir verða førd saman og tað óvæntaða hendir, merkist stundum ein endurloysandi speirekandi skemtiligur undirtóni og spoysk frástøða.







